## Aung sjúk

Andstøðuleiðarin í Burma, Aung San Suu Kyi, er veik, eftir at ikki hevur etið í fleiri dagar.Tað skrivar amerikanska tíðindastovan AP frá sínun keldum í Burma. Sambært keldunum hevur andstøðuleiðarin havt ilt við at fáa mat niðurum. Tí hevur hon einki etið í fleiri dagar, og nú hava læknarnir gjørt av at geva henni flótandi føðsluevni. Aung San Suu Kyo, sum er 63 ára gomul, hevur sitið í húsavarðhaldi í heimi sínum í Rangoon í 13 av teimum seinastu 19 árunum orsakað av politiska virksemi sínum. Sambært AP sluppu tveir læknar at kanna hana í síðstu viku.



## Avrættingar í Saudiarabia

Hóast hvassar atfinningar uttaneftir halda myndugleikarnir í Saudiarabia fram við at fullføra deyðadómar. Í morgun frættist, at fimm menn, sum høvdu fingið deyðadóm fyri ymisk brotsverk, vóru tiknir av døgum. Teir blivu hálshøgdir í býnum Medina. Sambært útlendsku tíðindastovunum var talan um fýra saudiarabar og ein mann úr Tjad, og teir vóru dømdir fyri at hava rænt børn og misnýtt tey kynsliga. Harumframt vóru teir dømdir fyri rúsevnahandil. Alment siga saudiarabisku myndugleikarnir, at 102 fólk vórðu tikin av døgum har í fjør, og at talið higartil í ár er 34.

# Neyðugt við tiltøkum







*Teir tríggir, Kaj Leo Johannesen, Jóannes Eidesgaard og Jørgen Niclasen, arbeiða í løtuni við at finna sparingar á komandi fíggjarlóg. Neyðugt verður at seta ópopuler tiltøk í verk*

**Tað sigur seg sjálvt, at tað ber ikki til við halli á fíggjarlógini upp á 700-800 milliónir, og tí verður neyðugt at seta tiltøk í verk. Men vit mugu ansa eftir ikki at skrúva blussið so langt niður, at alt steðgar upp, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkismálaráðharri**

FÍGGJARLÓG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Teir tríggir formenninir í samgongufloksunum eru samdir um, at neyðugt verður við tiltøkum fyri at fáa javnvág aftur í fíggjarlógina. Tí hava teir arbeitt intenst seinastu tveir mánaðirnar við at gjøgnumganga fíggjarlógina.

- Alt skal gangast ígjøgnum og tað stendur greitt, at neyðugt verður við ópopulerum tiltøkum, sigur Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum.

Saman við Kaj Leo Johannesen og Jóannes Eidesgaard vendir hann í hesum døgum hvørjum steini fyri at finna sparingar. Enn er ikki komið á mál, men Jørgen Niclasen vónar, at ein semja fæst um tiltøkini rímiliga skjótt.

- Tað er sjálvandi neyðugt, at samgongan er samd fyrst, men tá tað er hent, er ætlanin at inndraga andstøðuna í málið soleiðis, at ein breið semja fæst um tiltøkini, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at talan verður um eina balansugongd, tí samstundis sum tiltøk skulu setast í verk má ansast eftir, at blussið ikki verður skrúvað so langt niður, at samfelagið steðgar upp.

- Tá kreppan var fyrst í 90-unum varð gripið ógvuliga kraftiga inn, og tað var við til at gera kreppuna uppaftur verri. Tí skulu vit ansa eftir ikki at gera sama feilin hesaferð eisini, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at tað sjálvandi er ein ideologiskur dystur millum flokkarnar um, hvussu tiltøkini verða skipað.

- Tað er eingin loyna, at vit ikki vilja nema við skattin. Man svevur seg ikki burtur úr einari kreppu, man arbeiðir seg úr henni, og tí skal tað loysa seg at arbeiða, sigur Jørgen Niclasen.

### Spara eina millión

Nú tá Samvit er lagt undir Uttanríkismálaráðið skal ein millión sparast á kontoini hjá teimum.

- Uppskotið er lagt niðan í Løgtingið, og er tí longu sett í verk. Tað stendur ikki púra greitt í løtuni, hvussu vit skulu spara hesa milliónina, men tað skal bara gerast, sigur Jørgen Niclasen.

Tað liggur tó ikki í kortunum, at sparingin skal fremjast á lønarkontoini.

- Vit hava ongar ætlanir í løtuni um at siga fólki úr starvi. Talan verður um náttúrliga frágongd, men tað ber hinvegin heldur ikki til heilt at útiloka, at onkur uppsøgn kann koma fyri. Men tað eru sum nevnt ongar ítøkiligar ætlanir um tað í løtuni, sigur Jørgen Niclasen.

Heldur ikki á Løgmansskrivstovuni eru nakrar ætlanir um uppsøgnir.

- Vit hava okkara fíggjarætlan at halda okkum til, og tað gera vit. Og tað verður ikki talan um nakrar uppsagnir hjá okkum hetta og árið út, sigur Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri.

### Ongar sparingar í ár

Men burtursæð frá sparingunum, sum henda í sambandi við samanleggingina av Samvit við Uttanríkismálaráðið, verða ongar aðrar sparingar framdar í verandi fíggjarári.

Petur Alberg, aðalstjóri í Fíggjarmálaráðnum, sigur, at ongar ætlanir eru um at áleggja aðalráðunum at fremja sparingar í ár.

- Tað eru samráðingar við aðalráðini, men tað er við atliti til komandi fíggjarlóg, sigur Petur Alberg.

Hann vísir eisini til politisku samráðingarnar millum floksformenninar.

- Tær samráðinharnar eru ikki lidnar enn, men um tey tiltøkini, sum verða sett í verk, fáa virkni longu í inniverandi ári, er ein politisk avgerð, sigur Petur Alberg.

Tað er tí einki sum bendir á, at talan verður um nakrar nevniverdar sparingar hjá ymsu aðalráðunum á verandi fíggjarlóg.